


18. des. Kl. 14.00 Dramaskúlin í Sjónleikarhúsinum spælir jólasjónleik í Grasagarði: Granntræið (Mumi leik)
kl. 16.00 Saxarnir spæla í gongugøtuni
kl. 18.00 Havnar Ungdoms-Hornorkestur spælir í Dr. Jakobsens gøtu

19. des. kl. 14.00 Dramaskúlin í Sjónleikarhúsinum spælir jólasjónleik í Grasagarði: Lítli Gutti.
kl. 17.00 Havnar Ungdóms-Hornorkestur spælir í Dr. Jakobsens gøtu
kl. 18.00 HH spælir í gongugøtuni

20. des. kl. 11.00 Frelsunar Herurin spælir í gongugøtuni
Kl. 14.00 Dramaskúlin í Sjónleikarhúsinum spælir jólasjónleik í Grasagarði: Granntræið (Mumi leik)
kl. 15.00 Jólamaðurin kemur til Havnar. Thorshavn kemur í Vágsbotn við jólamonnunum og GHM spælir.
kl. 15.30 Sangur úr Evangeliihúsinum í Grasagarði
kl. 16.00 GHM spælir í gongugøtuni
kl. 18.00 Glymur syngur í gongugøtuni

Jólamenninir verða í býnum hvønn seinnapart frá 20.-23. desember

**Kunningarstovan**

# BILSKROKK




**Lakkering & Plátuverkstaður**



Vit ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggj ár.

**Vit hava opið aftur 05-Jan-2004.**

Slættanesgøta 9 - boks 2227 - Fo-110 Tórshavn - Tlf. 322471

# Hús til sølu

**Sethús, matr. no. 599 á Toftum.**

Húsini eru o.u. 90 m² uttan, við stjørnutaki. Grundstykkið er o.u. 600 m² til víddar.

Miðhæddin er innrættað við duri, vásakøki, klædna- og kjøthjalli í einum lítlum útbygningi (17 m²). Í høvuðsbygninginum (73 m²) er gong, klædnarúm, køkur, stova, eitt størri og eitt minni kamar, bæðirúm við wc umframt eitt annað lítið wc.

Kjallarin, sum er í fullari hædd, er óinnrættaður.

Byggiárið er 1949 (útbygt 1980). Húsini standa yvir havnarlagnum mitt í bygdini. Tey eru væl hildin og í sera góðum standi.

Áhugað kunnu ringja á tel. 448502, 218502 ella 220625.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3351, P/F ERO, 620 Runavík.

**Viðtøkur broyttar:**
13.11.2003
**Kapitalur:**
Hækking við kr. 4.000.000,00 til kr. 4.800.000,00.
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 4.000.000,00 við Skuldarumskifti til kurs 100.

*Skráseting Føroya tann 16. desember 2003*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 1856, P/F Súsi, 100 Tórshavn. Viðtikið 26.11.2003 at lækka partapeningin við kr. 1.500.000,00 til kurs 100 við útgjalding til partaeigarar, eftir at proklama er runnin.

*Skráseting Føroya tann 15. desember 2003*

*Kristin Balle*

---








**Runavíkar kommuna søkir eftir**

# Pedagogum og avloysara

**til Barnagarðin á Mýrunum**

Barnagarðurin á Mýrunum er normeraður til 82 børn. Stovurnar eru skipaðar við 2 vøggustovum við 14 børnum í hvørjari, og 3 barnagarðsstovum við 18 børnum í hvørjari.

Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felagsrúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið.

Endamál stovnsins er, við støði í tí einstaka barninum at geva tí møguleika at mennast, bæði persónliga og saman við øðrum. Fyri at røkka málinum er neyðugt við einum tryggum og stimbrandi umhvørvi, við góðum samstarvi millum leiðslu, starvsfólk og foreldur.

Vit ynskja tí at umsøkjarin:
- hevur umsorgan fyri børnum
- hevur góð samstarvsevni
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin
- er nýhugsandi og ígongdsetandi

Søkt verður eftir 6 pedagogum á 35/40 t. um vikuna, lønarstig 10-16 og barnsburðaravloysara fyri hjálparfólk á 25 t. um vikuna, lønarstig 1-5.

Setan verður frá 1. mars 2004 ella eftir nærri avtalu.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Fríðu Lómstein, leiðara ella Conny Jacobsen, varaleiðara á tlf. 448254 ella 218254

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi 12. januar 2004, kl. 12.00.

**Runavíkar Kommuna**
**Sosiala deild**
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará

# Programmfólkastarv í Sjónvarpi Føroya

Vegna vantandi umsóknir endurlýsir SvF eitt fast starv sum programmfólk.

**Uppgávur:** Í høvuðsheitum tíðindi og aktuellar sendingar og í minni mun sendingar á øðrum programøkjum í SvF. Arbeiðið er skipað í vaktir við skiftandi arbeiðstíðum.

**Førleikakrøv:** Vit søkja eftir fólki við royndum og útbúgving innan tíðindaøkið. Aðrar útbúgvingar/-royndir, ið innibera fakligt innlit í samfelags- og búskaparviðurskifti, kunnu eisini koma upp á tal. Vit vænta okkum, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur hollan kunnleika til føroysk samfelagsviðurskifti og til føroyskt mál.

**Løn og setanartreytir:** Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir** við prógvum, viðmælum og CV verður at senda til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 23. desember. Starvið verður sett frá 1. februar ella skjótast til ber.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sjónvarp Føroya, tlf. 340400, og tala við Mikkjal Helmsdal, stjóra, ella Katrin Petersen, virkandi tíðindaleiðara.

Sjónvarp Føroya, M.A. Winthersgøta 2, 100 Tórshavn

SISERO 351800

# JEEPAR

**Rexton RX290 4x4 nýggjur**



- Mercedes motorur
- 2.9 litur
- Aircondition
- El-rútar v.m.

Vørubilur, prísir úr **238.648,-** v/mvg
Persónbilur, prísir úr **311.190,-** v/mvg

**Galloper Innovation 2.5 TD Intercooler**



prísur **158.000,-**

- Gráur metalllakk
- Árgang 1999
- Km. 95.000
- 5 setur · Aircondition
- Altimetur · El-spegl
- El-rútar framman
- Hita í setrum
- Tokulyktir
- Lættmetalfelgur við heilársdekkum
- Summardekk fylgja við
- Vælhildin

**BILVERKSTAÐIÐ**
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 21 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

Sosialurin 341800

# BILASØLAN CARRO



**4 stk. VW Golf 1.9 SDI Stationcar**
- Diesel
- Allir árgang nevember 2000
- Koyrt millum 91.000 og 112.000 km.
- Sera væl hildnir

**Prísir úr 139.500,-**

**TEL 21 25 51**

FLEIRI BILAR ERU AT SÍGGJA Á:
www.carro-bilar.com

Sosialurin 341800

# Frá Arbeiðarafelagnum »Hæddini«

Skrivstovan er stongd vegna jólaferiu, frá 22. desember til 5. januar 2004.

**Nevndin**

# Bilur til sølu

Nissan Patrol, grønur, 5 hurðar, diesel, árg. mai '99, el-rútar, krók, 7 setur, leður, koyrt 81.500 km, heillakeraður í september '03. 4 nýggj dekk.

Vinarliga ring **227321**
best eftir kl 18.00

**Toll- og Skattstova Føroya Stýrið**

## AFTURLATIÐ

Millum jól og nýggjár, tvs. 29., 30. desember, er afturlatið á øllum avgreiðslum hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

Undantikið er tó Posttollurin á Óðinshædd í Tórshavn, sum hevur opið sum vanligt.

Sí eisini heimasíðuna: www.tollskatt.fo

**Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið**
**15. desember 2003**